

*Møguliga kemur hesin at avloysa Ford Escort vørubilin. Fusion er ein rúmligur mini MPV*



*Fusion innan. Minnir nakað um nýggja Fiesta*




*Við setrum í er viðførisrúmið stórt og arbeiðsvinarligt. Baklúkan kemur heilt niður til kúfangarin*

# Ford Fusion umbyggjast til føroyska marknaðin

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hóast teir hjá P/F Wenzel hava alla grund til at vera væl nøgdir við vøruskránna hjá Ford, tá nýggi Fiesta er komin seinni í ár, sakna teir tó ein bil ístaðin fyri Ford Escort vørubilin, sum teir seldu so nógvar av. Møguliga verður tað Ford Fusion, ið loysir hendan trupulleika

Tá sølustjórin hjá Ford herfyri var á vitjan í Føroyum, bóru teir hjá Wenzel uppá mál við hann, at teir saknaðu ein bil ístaðin fyri Escort vørubilin, sum var ein rúmligur vørubilur til sera kappingarføran prís. Teir vóru t.d. nógv seldir sum arbeiðsbilar hjá fyritøkum og bøndurnir vóru væl nøgdir við teir.

### Høgur og rúmligur

Ein møguleiki, teir samráddust um, var at umbyggja Ford Fusion, sum kemur á marknaðin síðst í hesum ella fyrst í komandi ári, til vørubil til føroyska marknaðin. Ford Fusion er ein mini MPV, ið er bygdur yvir nýggja Fiesta plattformin, men er nakað størri enn Fiesta. Motorarnir verða teir somu sum í Fiesta. Bilurin er høgur frá vegnum og sera rúmligur. Hvussu ein tílíkur bilur verður móttikin valdast prísin og hvussu arbeiðsvinarligur Fusion verður.

# Ford Transit: Til tørvin hjá einstaka kundanum

**Ford Transit komu fyrstu ferð á marknaðin í 1965. Í fjør kom ein heilt nýggjur Transit á marknaðin. Bilurin bleiv beinanvegin kosin "Van of the Year 2001" í Evropa. Transit klárar seg væl í kappingini um miðalstóru vørubilarnar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Hjá P/F Wenzel kom tað væl við at fáa ein nýggjan Transit í sølubúðina. Forgangarin var vorðin rættuliga gamal, og kundi als ikki kappast við aðrar vørubilar á marknaðinum. Við nýggja Transit vóru allir møguleikar at vera við í kappingini um miðalstóru vørubilarnar.

### Nógvar útgávur

Nýggi Ford Transit verður gjørdur í fleiri ymiskum støddum. Sum vørubilur fæst hann í fleiri longdum, við høgum ella lægri laki, sum lastbilur við einkultari ella dupultari kabinu, styttri ella longri aksilfrástøðu. Eisini fæst hann minibussur við upp til 17 sitiplássum.

### For- og bakhjóltrekk

Í teimum størru og tyngru útgávunum hava teir bakhjóltrekk, meðan teir minnu og lættari bilarnir hava forhjólstrekk. Ford hava lagt seg eftir at gera ein bil , sum lagar seg eftir tørvinum hjá tí einstaka kundanum. Lættir vørubilar, sum sjáldan eru munandi lastaðir, klára seg best við forhjólstrekk, meðan teir sum javnan koyra við tungum lessi, klára seg betur við bakhjólstrekk.




*Ford Transit bleiv ársins vørubilur í Evropa í 2002. Her eru sølumenninir hjá P/F Wenzel, Leif Hougaard og Jógvan Højgaard, við einum Transit vørubili*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Sum vørubilur fæst Transit í nógvvum ymiskum støddum og útgávum*

## Ford Transit 280S Van

Motorurin: 2.0 litur 4 syl. 16V turbodiesel 100 hk
v. teldustýrdari oljuinnspræning

| | |
|---|---|
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 483,4 cm |
| Breidd | 197,4 cm |
| Hædd | 198,2 cm |
| Eginvekt | 1650 kg |
| Loyvd totalvekt | 2650 kg |
| Prísir frá | 199.269 v/MVG |

Søluumboð:
P/F Wenzel
Akranesg. 5
FO-100 Tórshavn
Tel. 313873



Ford Focus:

# Heimsins mest seldi persónbilur

**Eftir at Ford Escort hevði verið á marknaðinum í nógvum ymiskum útgávum í heili 33 ár, og seldur í 20 milliónum eindum, steðgaði framleiðslan í 2000. Avloysarin bleiv Ford Focus, ið eftir stuttari tíð bleiv heimsins mest seldi bilur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tað er ikki uttan grund at Ford Focus er heilmsins mest seldi bilur. Hann er væl koyrandi og rúmligur, og fæst í útgávum við 3 og 5 hurðum, sum sedan og sum stationvognur. Hvat útgerð viðvíkur eru hesir møguleikarnir: Ambiente, Trend, ST 170 og Ghia.

### TDCi dieselmotor

Focus fæst við 5 ymiskum bensinmotorum frá 75 til 170 hk. Tveir dieselmotorar eru á skránni við ávikavist 90 og 115 hk. Tann størri er ein TDCi við nýggjastu tøknini. Tað, at brennievnið verður sprænt inn í motorin í smærri nøgdum undir høgum trýsti, gevur javnari oljunýtslu, og motorurin larmar minni. Hesir TDCi motorar larma so lítið, at tey ferðandi í bilinum lættliga kunnu tosa saman, hóast motorurin hevur nógv at gera.

### Best í TÜV kanning

Í ár bleiv Ford Focus nummar eitt í týsku TÜV kanningunum. Hetta var fyrstu ferð í 14 ár at ein týskur bilur hevur lagt seg á odda í hesi kanning. TÜV kanningarnar eru frágreiðingar um hvussu bilarnir klára seg eftir nøkrum árum. Focus eru eisini sera væl umtóktir á amerikanska marknaðinum.




*Focus bleiv eftir stuttari tíð heimsins mest seldi bilur. Her er Jógvan Højgaard, sølumaður, við nýggjastu útgávuni av Focus*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Focus innan. Rattið kann stillest eftir egnum ynski*

## Ford Focus 1.6i Trend 5/h

Motorurin: 1.6 litur 4 syl. 16V Zetec 100 hk

| | |
|---|---|
| 0-100 km/t | 11,2 sek |
| Bensinnýtsla | 14.5 km/l |
| Dekkstødd | 195/60-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 417,4 cm |
| Breidd | 170,2 cm |
| Hædd | 144,0 cm |
| Eginvekt | 1075 kg |
| Viðførisrúm | 350 litrar |
| Prísur | frá kr.168.560 |

Søluumboð:
P/F Wenzel
Akranesg. 5
FO-100 Tórshavn
Tel. 313873
www.wenzel.fo